# Todi og FCK eru langt frá hvørjum øðrum

**Semja fekst ikki um nýggjan sáttmála fríggjadagin, og hóast báðir partar siga seg vóna, at talan verður um nýggjan sáttmála, so er eingin nýggjur fundur ásettur**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Todi Jónsson og leiðslan í FCK tykjast vera langt frá hvørjum øðrum, nú føroyska álopsessið roynir at fáa nýggjan sáttmála í lag við felagið*

Todi, du skal bli' hos os. Soleiðis geltu rópini í Parkini seinnapartin sunnudagin. FCK áskoðararnir fylgja væl við í, hvussu tað gongst við sáttmálasamráðingunum millum Toda Jónsson og ítróttarstjóran, Niels-Christian Holmstrøm. Einki er enn komið burturúr, og tá ið FCK sunnudagin setti punktum fyri framúr góða heystið, var eingin ivi í, hvat áskoðararnir vilja og ynskja.

Fríggjadagin hittust Todi Jónsson og Niels–Christian Holmstrøm at vita, um tað var møguleiki at koma víðari við samráðingunum um nýggjan sáttmála. Men aftur hesa ferð fóru teir báðir frá borðinum, uttan at nøkur semja var komin í. Og Todi Jónsson dylur ikki, at tað er langt ímillum tað, sum hann vil hava fyri at halda fram í FCK, og so tað, sum FCK bossurin er sinnaður at lata.

– Tað snýr seg bæði um tað fíggjarliga og um longdina á sáttmálaskeiðnum. Tað er stórur munur á krøvunum, sum eg havi sett, og so tí, sum teir eru sinnaðir at ganga við til. Nú eru tað tveir mánaðir síðani, at teir komu við einum tilboði, sum eg á ongan hátt vildi ganga við til. Eg havi sagt teimum, hvat eg vil hava, men teir hava avvíst tí blankt. Tá ið vit skiltust fríggjadagin, varð eingin nýggjur fundur ásettur. Eftir ársskiftið havi eg rætt til at tosa við onnur feløg, uttan at FCK skal blandast uppí. Eingin nýtist at ivast í, hvat eg eri mest sinnaður til. Í einum so stórum felag sum FCK verður tað altíð kapping um plássini á liðnum. Tað havi eg gjørt upp við meg sjálvan at liva við. Tað kann vera, at krøvini hjá mær hava verið stór, men teir hava avvíst teimum sum útgangsstøðið fyri samráðingum, sigur Todi Jónsson.

Niels–Christian Holmstrøm segði sunnudagin, at hann framvegis vónar, at tað fer at eydnast teimum at semjast við Toda um nýggjan sáttmála. Hann leggur afturat, at europeiskur fótbóltur ikki longur er eitt sjálvtøkuborð hjá spælarunum. FCK venjarin, Hans Backe, sigur, at hann leggur seg ikki út í sáttmálasamráðingar, men eingin ivi skal vera um, at hann vónar, at Todi Jónsson fer at halda fram í FCK.

## Góð reklama

Sunnudagin gjørdi Todi góða reklamu fyri sær sjálvum. At hann eigur rætt til lønarhækkan og eitt langt sáttmálaskeið vísti hann við so góðum og hugflogsríkum spæli, sum hann ikki hevur víst í hesum kappingarárinum. Og so setti hann trumf á við at skora tvey góð mál og við at vera við í uppspælinum til triðja málið, sum Zuma skoraði í 3–0 sigrinum á botnliðnum Silkeborg.

Zuma og Todi vóru á toppinum. Todi setti hol á, tá ið stórt korter var farið. Thomas Røll legði innfyri úr høgru, og við handara stólpan tveitti Todi seg fram og stýrdi bóltinum í netið.

Fimm minuttir seinni skoraði Todi aftur. Hesa ferð legði Morten Bisgaard, sum var sera væl upplagdur, innfyri úr høgru, Todi Jónsson var hægstur og stútaði í meskarnar.

Eina lílta løtu seinni var Todi við í uppspælinum til 3–0 málið. Hann legði bóltin fram í høgru til Bisgaard, sum sendi innfyri til Zuma. So var lagt upp til stórsigur, men í 2. hálvleiki tóku teir í FCK sær av løttum. Tað løgdu nógvu áskoðararnir ikki so nógv í. Teir fegnaðust yvir, at FCK er níggju stig frammanfyri næstu kappingarneytarnar. Men teir eru ikki álvuligir við veruleikan, at FCK ikki hevur tryggjað sær undirskriftina hjá Toda Jónsson um samstarv eftir summarfrítíðina komandi ár.

At tað eru fleiri, sum halda nógv um Toda, sæst m. a. í Ekstrablaðnum í gjár. Har verður Todi Jónsson sagdur at vera – tá ið hann ikki er skaddur – tann mest kompletti álopsspælarin í Norðurlondum. Tað er ikki eiti á skoðsmáli.

## Tølini tala

Í heyst tóktist tað leingi, at hetta kappingarárið skuldi gerast heilt kiksað hjá Toda. Nú síðsti dysturin er spældur undan vetrarsteðginum, ber til at staðfesta, at talan hevur verið um góða úrtøku. Todi var leingi á beinkinum, og onkra ferðina var hann settur heima við hús, meðan liðfelagarnir vardu fremsta plássið í superliguni.

Men tá ið alt kemur til alt hevur árið roynst væl. Í hesum kappingarárinum hevur Todi skorað seks mál í superliguni, hann hevur skorað trý mál í Europa Cup og eitt í donsku steypakappingini. Sambært heimasíðuni todi.fo er Todi tann FCK spælarin, sum í hesum álmanakkaárinum hevur skorað flest mál fyri FCK. Samlaða talið síðani á nýggjárinum er átjan. Næstflest mál hevur Peter Møller – orsaka av skaða var hann ikki við sunnudagin – skorað. Talið hjá honum er fjúrtan. Av teimum eru átta í superliguni, sum nú er farin í vetrarfrí.

## Danska superligan

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 18 | 11 | - | 5 | - | 2 | 30 | 16 | 14 | 38 |
| 2 | Brøndby (M) | 18 | 8 | - | 5 | - | 5 | 36 | 20 | 16 | 29 |
| 3 | Farum | 18 | 9 | - | 0 | - | 9 | 26 | 35 | -9 | 27 |
| 4 | AaB | 18 | 8 | - | 2 | - | 8 | 25 | 27 | -2 | 26 |
| 5 | Esbjerg | 18 | 6 | - | 7 | - | 5 | 37 | 36 | 1 | 25 |
| 6 | FCM | 18 | 6 | - | 6 | - | 6 | 26 | 23 | 3 | 24 |
| 7 | AB | 18 | 5 | - | 8 | - | 5 | 23 | 20 | 3 | 23 |
| 8 | OB (S) | 18 | 6 | - | 5 | - | 7 | 28 | 26 | 2 | 23 |
| 9 | AGF | 18 | 6 | - | 4 | - | 8 | 26 | 33 | -7 | 22 |
| 10 | Køge | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 30 | 40 | -10 | 22 |
| 11 | Viborg | 18 | 5 | - | 6 | - | 7 | 31 | 35 | -4 | 21 |
| 12 | Silkeborg | 18 | 4 | - | 5 | - | 9 | 23 | 30 | -7 | 17 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)



# Avgerðandi úttøkukappingin í dag



*Seinasta úttøkukappingin til NM í skúlatalvi verður nú hildin*

**Talvsamband Føroya skal í feburar komandi ár vera vertur fyri stóru Norðurlendsku skúlatalvkappingini. Kappingin verður 14.-16. februar**

TALV
*Tíðindaskriv frá Talvsambandi Føroya*

Av tí at kappingin er í Føroyum er ætlanin at føroysku telvarnir skulu spenna seg rættiliga út. Vanligt hevur verið, at talvsambandið hevur tikið telvarnar út, men hesuferð hava allir ungir føroyskir telvarar havt møguleikan. Talvsambandið bjóðaði øllum til tvær undankappingar og eina avgerðandi úttøkukapping, sum verður í dag. 2 telvarar úr hvørjum aldursbólki sleppa við.

Undankappingarnar vóru í Vestmanna og í Klaksvík. 8 teir bestu telvarnir í hvørjum aldursbólki skulu so telva um tet tvey plássini í NM kappingini í februar.

### Martin og Hans Kristian sjálvskrivaðir

Bara tveir telvarar sleppa undan at telva undankappingina. Tað eru teir báðir OL telvarnir Martin Poulsen og føroyameistarin Hans Kristian Simonsen. Í elsta aldursbólkinum eru teir í serklassa og skulu umboða Føroyar. Martin vann bronsu í seinastu kapping og Hans Kristian vann snarkappingina.

Í hinum fýra bólkunum vera dystir um tey bæði atgongumerkini. Tríggir bólkar vera avgjørdir í dag og hin seinasti, bólkurin fyri dreingir føddir í 1986/87 verður avgreiddur næsta vikuskiftið.

Hjá teimum sum dáma bæði telving og ættargransking — og tey eru ikki so fá, kann tað vera spennandi at lesa nøvnini á teimum 32 telvaranum, sum skulu telva um at umboða Føroyar í norðurlandameistarakappingini. Á listanum eru fleiri nøvn sum ganga aftur og aftur í kongarøðini við føroyameistarum.

Teir 8 sum skulu telva í bólkinum 1986/87 eru Rani Baldursson úr Klaksvíkar Talvfelagi, Sjúrður Thorsteinsson av Tvøroyri, Jóhan Hendrik Ellefsen úr Miðvágs Talvfelagi, Olaf Berg og Tummas Hans Rubeksen úr Havnar Telvingarfelagi, Andras Ortind úr Sørvági og Per Jacobsen úr Gøtu Talvfelagi. (telvað næsta vikuskiftið)

**1988-89:**

Fríðbjartur D. Olsen, Rógvi Mortensen, Henry Berg og Bjarni Jacobsen úr Havnar Telvingarfelagi, Heri Thomsen, Andras Mikkelsen og Sam Jacobsen úr Gøtu Talvfelagi, Ingi W. Joensen úr Miðvágs Talvfelagi,

**1990-91:**

Rógvi Dragaberg, Dánjal P. Jacobsen, Eilif Arge, Bogi Hansen og Regin Sivertsen allir úr Klaksvíkar Talvfelagi, Helgi D. Ziska og Margar Berg úr Havnar Telvingarfelagi og Dia Guttesen úr Gøtu Talvefelagi.

**1992 og yngri:**

Eli Nolsøe Leifsson, Bárður Jacobsen og Magnus Dánjalsson Klaksvíkar Talvfelagi, Hjalti Toftum og Heiðrikkur Jacobsen úr Havnar Telvingarfelagi, Rógvi E. Nielsen úr Sandavágs Talvfelagi, Johan Vørmadal og Jógvan E. Joensen úr Vestmanna Talvfelagi.

## 1.deild – 4. umfar

Trý lið býta fyrsta plássið eftir fjórða umfar. Havnarmenn og toftamenn tóku hvalvíkingar aftur eftir at seinast nevndu taptu móti kollfirðingum.

Toppskorari í 1. deild er fyrrverandi føroyameistarin Jens Kristian Hansen av Toftum. Hann hevur vunnið øll síni fýra talv, og hevur sjálvsagt stóra æru av flottu úrslitinum hjá toftamonnum. Við honum á øðrum borði og Boga Ziska á fyrsta borði kunna teir væl møguligt endurvinna FM-heitið frá 1987.

**KT – TFS 3-1**

| | |
|---|---|
| Hans K. Simonsen – Martin Brekká | 1-0 |
| Torbjørn Thomsen – Finnbjørn Zachariasen | = |
| Eyðálvur Johannesen – Bergur Magnussen | = |
| Grettir Djurhuus – Gunnar Joensen | 1-0 |

**KTF – HT 1,5 – 2,5**

| | |
|---|---|
| Ólavur Simonsen – Martin Poulsen | 0-1 |
| Rani Nolsøe – Olaf Berg | 1-0 |
| Tummas M. Anthoniussen – Herluf Hansen | 0-1 |
| Ingolf Gaard – Jóhan Gaard | = |

**TT – VT 3-1**

| | |
|---|---|
| Bogi Ziska – IM John Rødgaard | = |
| Jens K. Hansen – John Jacobsen | 1-0 |
| Wenzil Højgaard – Jákup Andreasen | = |
| Helgi Joensen – Jón Mikkelsen | 1-0 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| TFS | 9,0 |
| TT | 9,0 |
| HT | 9,0 |
| KT | 8,5 |
| KTF | 8,0 |
| VT | 4,5 |

**2. deild**

| | |
|---|---|
| RT – HT2 | 3,5 – 0,5 |
| ST – KTF | 3,5 – 0,5 |
| VT – HT3 | 2-2 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| RT | 10,5 |
| ST | 10,0 |
| KTF | 7,5 |
| VT | 7,0 |
| HT3 | 7,0 |
| HT2 | 6,0 |

# Martin streyk enn einaferð við sigrinum

**Martin Poulsen — Ólavur Simonsen FM-lið 2002/2003 (4), 01.12.2002**

TALVIÐ HESA VIKUNA:
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Martin Poulsen hevur í nýggjari tíð vunnið flestar ferðir enn aðrir føroyingar á Ólavi Simonsen. Heili fýra ferðir innan seinastu trý árini. Í vikuskiftinum hittust teir á 1. borði í dystinum millum Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag. Havnarmenn kundi fegnir leita suður aftur til høvuðsstaðin við einum 2,5 — 1,5 sigri.

Martin vann Ólavi, Rani Nolsøe vann á Olaf Berg, Herluf Hansen vann á Tummas M. Anthoniussen og Jóhan Gaard og Ingolf Gaard leiktu javnt.

Í mikudagsblaðnum verður at frætta um úrslitini úr liðkappingini, umframt endaligu úttøkukkappingini til NM fyri børn/unglingar, sum bleiv leikt leygardagin í Havnini.

Talvið millum Martin og Ólav gekk soleiðis:

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Ric3 Rif6 (Firespringerspil, sum byrjanin kallast við danskari tungu) 4.Bb5 d6 5.d4 exd4 6.Fxd4 (minnir ikki sørt um variant í skotsku byrjanini) 6...Bd7 7.Bxc6 Bxc6 8.Bg5 Be7 9.0—0—0 0—0 10.e5 (áhugaverdur leikur. Gevur kanska ikki hvítum beinleiðis fyrimun, men er helst taktiskt spæl frá Martini. Ólavur er jú tiltikin álopstelvari, men við hesum leiki avviklar Martin støðuna til endatalv (sum Ólavur eisini er kringur í_) 10...Rie8 11.Bxe7 Fxe7 12.exd6 Fxd6 13.Fe3 Ff6 14.Rie5! (rætt er at býta riddarin við bispin) 14...Rid6 15.Rixc6 bxc6 16.Fd4 Fg5+ 17.f4 Fa5 [17...Fxg2?? 18.Rhg1] 18.Rhe1 Rfe8 19.Re5 Fb6 20.Ria4 Fa6 21.Ric3 f6 22.Rxe8+ Rxe8 23.Ff2 Fb6 24.Fd4 Kf7 25.b3 Fa5 26.Kb2 Rb8? (Ólavur sær kongaálop fyri sær frúgvamegin, men fær váttan klút at kenna næstu leikirnir. Rætti leikurin var f5, men hvítur hevur tó kortini ein heldur sunnari støðu) 27.Rie4! Rib5? [27...Rd8 28.Rixd6+ Rxd6 29.Fc4+ Rd5 er besta boðið, men ífylgju talvforritinum Fritz 7 hevur hvítur fyrimun, enntá nærum vinnandi] 28.Fc4+ Kg6 [28...Kf8 vildi verið drúgvari, men tapur eisini]



29.f5+! (nú hevur Martin sæð mátið) 29...Kxf5 (Kh6 30.Fd3) 30.Rig3+ Kg6 31.Fg4+ Kf7 32.Rd7+ Ke8 33.Fe6+ Kf8 34.Ff7# 1—0